## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi, seinnapartin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt, menn seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið av eystri og regn. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og ælingur, seinnapartin minni vindur av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í hvassan vind av landsynningi og regn, sunnudagin upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Søgan hjá KÍ í bók

**KÍ – søgan, fyrsta bók, verður løgd fram á samkomu fríggjakvøldið 20. november. Árni Dahl hevur skrivað bókina, ið ber heitið, Bóltspæl millum Klakk og Kjøl**

ÚTGÁVA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast hetta kappingarárið ikki hevur verið besta mansliðnum hjá Klaksvíkar Ítróttarfelag til vildar, so hevur nevndin í felagnum hildið fast við, at søga felagsins skuldi skrivast, so sum avrátt varð við Árna Dahl, rithøvund, á sumri í 2008.

Truplu umstøðurnar hava gjørt, at løtur hava verið, har verkevninum lá vátt undir føti, men nú eru allar forðingar beindar av vegnum, og fríggjakvøldið 20. november verður bókin løgd fram.

Hetta fyrsta bindið í søgurøðini um KÍ, snýr seg um fyrstu 50 árini frá 1904 til 1954. Bókin er 330 síður í átta høvuðspørtum:

Bókin er skrivað út frá fyrstu gerðabókum felagsins og teirri søgubók, sum John Reid Bjartalíð, sáli, fór at føra felagsins vegna tíðliga í 1940-árunum. Harumframt hevur verið kagað í bløð og bøkur, og høvundurin hevur prátað við fleiri av teimum, sum minnast umstøður og hendingar frá um 1930 og upp til okkara dagar.

Í bókini eru um 170 myndir, m.a. eru allir nevndarlimir felagsins hesi fyrstu fimmti árini avmyndaðir. Aftast eru eisini lýsingar av dyggastu stuðulsleikarunum árini fram móti 50-ára degnum.

Árni Dahl sigur, at søgan hjá KÍ og Stjørnuni hetta skeiðið er søgan um samanhald og sigrar. Høvundurin hevur skrivað 2. bind, sum snýr seg um tíðina frá 1955 til 1974. Tann bókin kemur ætlandi út komandi heyst.

Grafia við Jastrid Gulaksen hevur brotið bókina um, og Føroyaprent hevur staðið fyri prentumsiting.




**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -4 |
| Qaqortoq | -3 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 13 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 10 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | 4 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | -2 |
| Bukarest | 4 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 12 |
| Malorca | 21 |
| Athen | 16 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 12 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | -- |
| New York | 14 |
| Miami | 28 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 16 |
| Panama | -- |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 985 hPa. yvir Íslandi fer norðureftir. Brúgvalagið haðani til Føroya hvørvur í ein landnyrðing.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Írland fer spakuliga norðureftir og dýpist. Ein veikur hátrýstryggur verður yvir Føroyum mikumorgunin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 3/11 kl. 06⁰⁰ – 4/11 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,9°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 3/11 kl. 06⁰⁰ – 4/11 06⁰⁰.
Avfallið higartil í oktober: 13 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

7. november — Mánin næstur jørðini
9. november — Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10.nov | 00:47 | 13:26 | - | 12:26 | 00:02 | 12:41 | 02:47 | 15:26 | 03:47 | 16:26 | 11:41 | - | 10:41 | 23:04 | 01:02 | 13:41 | 02:02 | 14:41 | 00:32 | 13:11 | 01:47 | 14:26 |
| 11.nov | 01:49 | 14:12 | 00:49 | 13:12 | 01:04 | 13:27 | 03:49 | 16:12 | 04:49 | 17:12 | 00:04 | 12:27 | 11:27 | 23:49 | 02:04 | 14:27 | 03:04 | 15:27 | 01:34 | 13:57 | 02:49 | 15:12 |
| 12.nov | 02:34 | 14:56 | 01:34 | 13:56 | 01:49 | 14:11 | 04:34 | 16:56 | 05:34 | 17:56 | 00:49 | 13:11 | - | 12:11 | 02:49 | 15:11 | 03:49 | 16:11 | 02:19 | 14:41 | 03:34 | 15:56 |
| 13.nov | 03:18 | 15:40 | 02:18 | 14:40 | 02:33 | 14:55 | 05:18 | 17:40 | 06:18 | 18:40 | 01:33 | 13:55 | 00:33 | 12:55 | 03:33 | 15:55 | 04:33 | 16:55 | 03:03 | 15:25 | 04:18 | 16:40 |
| 14.nov | 04:03 | 16:27 | 03:03 | 15:27 | 03:18 | 15:42 | 06:03 | 18:27 | 07:03 | 19:27 | 02:18 | 14:42 | 01:18 | 13:42 | 04:18 | 16:42 | 05:18 | 17:42 | 03:48 | 16:12 | 05:03 | 17:27 |